# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Allur heimurin veit, at Serbia fer ongantíð at viðurkenna Kosovo sum eitt sjálvsstøðugt ríki (Vojislav Kostunica).*

**STUTT SAGT**

## Burma fær vápn

Hóast USA og ES hava bannað sínum fyritøkum at selja hernaðarstýrinum í Burma vápn, so bendir nógv á, at bannið fær ikki tann stóra týdningin. Vælvitandi keldur siga, at Burma keypir vápn úr India og Norðurkorea, men at tað mesta kemur úr londum sum Kina, Russlandi og Serbia. Vápnasøla til Burma er lóglig, tí eingin altjóða regla ella samtykt bannar londum at selja hernaðarstýrinum vápn.

## Kleimd í hel

Minst tólv fólk vórðu kleimd í hel á einum hindu-festivali í India um vikuskiftið. Indisku myndugleikarnir siga, at festivalplássið var ætlað til 200.000 fólk, men at 600.000 komu. Tað gjørdist ógvuiliga trongt, og tá fólk royndu at sleppa burtur, vórðu minst tólv teirra kleimd í hel. Fleiri onnur fingu skaða. Av teimum tólv vóru fýra kvinnur og fýra børn. Ein onnur vanlukka skaðaði India í gjár. Har norðuri í landinum doyðu seks fólk, tá ein bumba brast í einari biohøll, siga myndugleikarnir. Eingin hevur átikið sær ábyrgdina av spreingingini.

## Søgulig flyting

Grikkar eru farnir undir at flyta nakrar av teimum gomlu skurðmyndunum úr templunum á Akropolis til eitt nýtt savn, sum ætlandi skal hýsa øllum teimum týdningarmestu lutunum úr teimum gomlu templunum. Harafturat er ætlanin hjá grikska myndugleikunum at fáa fatur á fleiri fornlutum, sum eru á British Museum í London og aðrastaðni, og at savna teir í tí nýggja savninum. Arbeiðið at flyta lutirnar av Akropolis byrjaði um vikuskiftið, og tíðindastovurnar skriva, at nógvir grikkar, sum vóru komnir at hyggja, feldu tár, tá teir stóru kranarnir lyftu teir gomlu lutirnar uppfrá.

# Jintao lovaði politiskar nýskipanir

**-Sambandið millum politisku leiðsluna og fólkið hevur ikki verið nóg gott, segði kinesiski forsetin, tá hann setti floksráðstevnuna í morgun**



*Hu Jintao lovar politiskar nýskipanir*

Kinesiski forsetin, Hu Jintao, setti árligu ráðstevnuna hjá kommunistaflokkinum í morgun við at lova kinesiska fólkinum politiskar nýskipanir. Hu Jintao legði afturat, at at bardagin ímóti korrupsjón fer at halda fram, og at Kina fer at bøta um viðurskiftini við Taiwan.

Í røðuni ásannaði forsetin, at teir politisku leiðararnir hava ikki havt nóg gott samband við fólkið, men at ábøtur eru á veg.

Meiri enn 2.200 fólk eru á ársfundinum hjá kinesiska kommunistaflokkinum, og tey fara ætlandi at velja Ho Jintao at halda fram sum forseti í eitt fimm ára skeið afturat.



*Bob Denhard var 78 ára gamal, nú hann doyði*

# Bob Denhard deyður

**Fyrrverandi franski leiguhermaðurin Bob Denhard doyði um vikuskiftið**

Bob Denhard er uttan iva tann best kendi franski leiguhermaðurin. Hann var við í kríggi ymsastaðni í Afrika í sekstiárunum og seinni, og hann var eisini uppi í fleiri statskvettum í afrikonskum londum.

Í juli í ár varð hann dømdur tiggju ára fongsul fyri at hava verið við til at fyrireika statskvett á Komorunum úti fyri eysturafrikonsku strondini í 1995. Franskir hermenn bardu kvettroyndina niðuir, og Denhard varð tikin til fanga og fluttur til Fraklands.

Í gjár kunngjørdi systir hansara, at hann var deyður.

# Kosovo verður ongantíð sjálvsstøðugt

**-Vit fara ongantíð at lata Kosovo frá okkum, sama hvussu stórt trýst verður lagt á okkum, sigur serbiski uttanríkisráðharrin**



*Vojislav Kostunica: -Vit fara ongantíð at loyva Kosovo at loysa frá Serbia*

Enn eina ferð er tann politiska støðan á Balkan spent. Júst sum umboð fyri albanararnar og serbarnar í Kosovo hittust í Bruxelles í gjár, gjørdi serbiski uttanríkisráðharrin greitt, at tað kemur ikki upp á tal at lata Kosovo loysa frá Serbia.

-Kosovo verður ikki sjálvsstøðugt ríki uttan góðkenning frá Serbia, og allur heimurin veit, at Serbia fer ongantíð at viðurkenna Kosovo sum eitt sjálvsstøðugt land, segði Vojislav Kostunica, uttanríkisráðharri.

Serbarnar og kosovoalbanararnir eru ósamdir um, hvørja støðu Kosovo skal hava í framtíðini. Partarnir hava tingast leingi saman við ES-semingsmanninum Wolfgang Ischinger og russiska diplomatinum Aleksander Botsan-Khartsjenko.

Nú fer tíðin at ganga undan. USA hevur boðað frá, at landið vil hava eina loysn fyrst í desember, og tann 10. desember skal ST hava eina frágreiðing um støðuna. Kosovoalbanararnir hava hótt við at skipa Kosovo sum sjálvsstøðugt ríki fyri jól, fæst ikki semja við serbararnar til ta tíð. Men Serbia er ikki til at vika.

-Tað kemur ikki upp á tal at lata Kosovo loysa, sigur Vojislav Kostunica, uttanríkisráðharri.

»Lívið sum handverkari«



Lívið sum handverkari er heitið á fyrilestri, sum Bettina Andersen fer at halda í hølum Starvsmannafelagsins J. H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn. Bettina Andersen greiðir frá og vísir myndir, um hvussu lív hennara er merkt av, at handverk er bæði hennara ítriv og vinnuvegur.

Fyrilesturin verður 17. oktober kl. 19.30, ókeypis atgongd.

Meira um Bettinu Andersen fæst at vita á www.bettinaandersen,dk og á www.husflid.dk



Føroya Heimavirkisfelag